# Skrivivegleiðing til heimasíður og online miðlar

## 1. Hvønn skrivar tú til? Kenn móttakaran!

Fyri at kunna gera gott innihald skalt tú gera tær trý ting greið:

1. Hvør er málbólkurin?
2. Hvat er mest týðandi fyri tey?
3. Hvat vilt tú hava tey at gera?

## 2. COPY/PASTE er ikki loyvt!

Einki innihald er galdandi í allar ævir. Tørvur og krøv hjá móttakarum broytast alla tíðina. Umhugsa altíð tekstin, um tú ikki skrivar hann frá grundini.

## 3. Skriva tað sum er týdningarmikið fyri móttakaran fyrst – ikki tað, sum er týðandi fyri teg ella tín stovn.

Kom til sakina! Brúkarin lesur sum oftast tín tekst fyri at avgreiða okkurt ella at kunna koma víðari í eini sjálvgreiðslu. Far burtur frá tekstum, sum allarmest handla um tín stovn, organisasjónina og alt dygdararbeiðið, ið er gjørt. Sum oftast er málbólkurin líkaglaður.

## 4. Fólk lesa ikki tað, sum vit skriva! Tey eru upptikin og fara leysliga ígjøgnum tað, ið er týdningarmikið fyri tey.

Skriva tí stutt, sjálvt um tað tekur longri tíð. Legg orku í yvirskriftir, samandráttir og tað, sum fólk skulu gera. Lat vera við at byrja við prosa, t.d. á hesi síðuni kanst tú lesa um..., her finnur tú kunning um...

## 5. Skriva aktivt til ein móttakara – ber teg undan at skriva passivt og í fleirtali.

Skriva: Tú kanst altíð set teg í samband við okkum. Lat vera við at brúka tygum og tit, ella samband fæst við at venda sær til stovnin.

## 6. Skriva yvirskriftir, sum kunnu standa einsamallar – ber teg undan einsamøllum orðum og vís á eina handling, set ein spurning.

Ikki skriva “Navnabroyting”, men “ert tú gift/ur? soleiðis fært tú nýtt navn”

### 7. Skriva vanligt føroyskt, ikki innanhýsis stovnsmál.

Brúka orðini, ið tín málbólkur brúkar. Um tað er neyðugt at brúka innanhýsis orð, so brúka eisini orðini hjá brúkarunum.

### 8. Skriva niðurstøðuna fyrst, síðani bakgrundina og til seinast smálutir og lógartekstir.

Tú nýtist ikki at fyrireika borgaran alt ov nógv, áðrenn tú kemur til tað týdningarmiklasta. Skriva tekstin til tey flestu, og lat tey fáu kava niður í smálutirnar niðast í innihaldinum. Lógartekstir og líknandi skulu ikki standa fremst.

### 9. Ger tað lætt at fáa yvirlit yvir innihaldið: brúka yvirskriftir, partar, linjubrot og set upp í punktum.

Góðar yvirskriftir og smá brot gera tað léttari at leita runt í innihaldinum, sum brúkarar skulu hava fatur á. Smá brot og punktuppseting bróta tekstin, og gera tað lættari at lesa innihaldið.

### 10. Brúka video, myndir, kort og ger dátur sjónligar, um tað gevur meining fyri móttakaran.

Gott sjónligt innihald kann vera avgerandi fyri, um kunningin verður væl móttikin, men bara um tað gevur virði til brúkaran. Ein videovegleiðing, hvussu tú brúkar eina skipan kann vera sera týðandi.

### 11. Leinkjur skulu brúkast rætt

Set ikki leinki mitt í ein setning. Leinki skulu setast á eini linju fyri seg. Lat vera við at skriva "Trýst her" ella "Les meira" í leinkið. Ger heldur ein stuttan tekst, sum leggur upp til leinkið, t.d. á heimasíðuni hjá ... kanst tú finna meira tilfar um eitt hvørt evni: - og so kemur leinkið á linjuni niðanfyri.

Durita Hansen, mars 2020